Bólkur C ✦ Rumenia



Disiplin skal geva úrslit

Rumenska landsliðið leggur stóra orku í disiplin á vøllinum, og so verður nógv lagt upp í hendurnar á álopsspælar-anum Adrian Mutu



Liðformaðurin Cristian Chivu skal skipað verjuspælið hjá rumenska landsliðnum
Mynd: Polfoto

RUMENIA
Eyðun Klakstein
eydun@sosialurin.fo

Rumeniski landsliðsvenjarin Victor Piturca er fyrrverandi álopsspælari, men sum venjari hevur hann lagt stóran týdning í disiplinina á sínum liði, og Rumenia leypur ikki fram av í sínum spæli, hóast teir duga væl at leypa á.

Hetta gav góð úrslit í farnu EM-undankapping, tí Rumenia vann sín undanbólk frammanfyri Holland og Bulgaria.

Piturca brúkar tveir verjukendar miðvallarar at hjálpa sínari verju, og samstundis verður nógv lagt á herðarnar á álopsstjørnuni Adrian Mutu, sum var toppskjútti við seks málum í farnu undankapping.

Mutu skorar

Rumeniski venjarin hevur heldur ikki fjalt út yvir, at Mutu hevur sera stóran týdning fyri hansara lið.

- Rumenia tapir sera sjáldan, og vit tapa so at siga ongantíð, tá ið Mutu skorar, sigur Piturca.

Seinastu fimm árini hevur Adrian Mutu skorað 24 mál í 19 dystum fyri rumenska landsliðið, og tá ið Mutu hevur skorað, hevur liðið ikki tapt.

29 ára gamli Adrian Mutu hevur havt eina skiftandi yrkisleið, og eftir vánaliga tíð í Onglandi og leikbann fyri rúsevnismisbrúk, hevur hann fótað sær aftur í Italia, har hann nú spælir fyri Fiorentina. Hann skoraði í farna kappingarári 16 mál fyri felagið.

Trupul bólkur

Rumenia er ein outsidari til EM-heitið. Landið hevur í undankappingini víst støðug avrik, og bert eitt tap í 12 dystum prógvar, at landið kann standa seg ímóti teimum flestu í Europa. Men spurningurin er so, um liðið hevur styrkina og profilarnar til at gera seg galdandi í einum endaspæli.

Liðformaðurin Christian Chivu skal skipað verjuspælið hjá liðnum, á miðvøllinum verða tað helst Nicolita og Petre, sum skulu tryggja sær balansuna, og so er stóri spurningurin, um Mutu hevur krút í gaggnum í summar. Rakar hann toppformin, so kann Rumenia saktans gera seg galdandi, men tað skal eitt avrik meira enn tað vanlig fyri at sleppa víðari frá bólkinum, har eisini Holland, Italia og Frakland eru við.

Rumenia

1	Bogdan Lobonţ
2	Cosmin Contra
3	Rţzvan Raţ
4	Gabriel Tamaţ
5	Cristian Chivu
6	Mirel Rţdoi
7	Florentin Petre
8	Paul Codrea
9	Ciprian Marica
10	Adrian Mutu
11	Rţzvan Cociţ
12	Marius Cornel Popa
13	Cristian Sapunaru
14	Sorin Ghionea
15	Dorin Goian
16	Bţnel Nicoliţţ
17	Cosmin Moti
18	Marius Niculae
19	Adrian Cristea
20	Nicolae Dicţ
21	Daniel Niculae
22	ţtefan Radu
23	Eduard Stţncioiu

Venjari: Victor Piţurcţ